

# Kamelurin og Pippi slóu tunnu

Í morgun kom myndamaður okkara fram á børn í Hoyvíkar skúla, ið slóu tunnu hendan føstulávintsmánadag. Næmingar og lærarar høvdu gjørt nógv burturúr degnum, og vóru flest øll grýluklødd. Grýlurnar høvdu pyntað seg við litføgrum búnum og andlitsmáling. Eina vaksna Pippi sóu vit, umframt at eitt sjónvarp – ella annar tøkniligur lutur – var millum tunnusláarnar, og ein sera snildisliga gjørdur kamelur. Vit lata myndirnar á síðuni tala fyri seg



*Myndir: Jens Kristian Vang*









